# ða byrjan



Frá hátíðarhaldinum, tá skrivstovan hjá Faroe Petroleum Noreg læt upp




fingið leitiloyvi saman við altjóða oljufeløgum so sum ConocoPhillips, Petro-Canada og stóra gassfelagnum Centrica. Aðrir partnarar eru Lundin Petroleum, Revus, Noreco, Pertra og PA Recources.

Faroe Petroleum luttekur við 20-30% í teimum 6 leitiloyvunum.

– Tað vísir seg longu at okkara ætlan um at fara inn á norskt øki var skilagóð og vit arbeiða longu nú sum góðkent felag saman við nøkrum at teimum bestu feløgunum á norskum øki. Noreg verður framhaldandi eitt týdningarmikið vakst-raroki fyri Faroe Petroleum konsernina sigur Nils Sørensen, stjóri.

Nú um dagarnar fekk Faroe Petroleum UK fimm leitiloyvi í bretskum øki. Í tveimum førum er felagið fyristøðufelag. Við hesum hevur felagið tilsamans 33 leitiloyvi.

Δ

# Noreg og Russland mugu gera seravtalu um Barentshavið



*Norðmenn og russar eiga at gera eina avtalu um Barentshavið, áðrenn onnur lond koma hagar, heldur Willy Østreng, professari*
*Mynd: Nordlys*

**Norðmenn og russar eiga at gera eina sínamillum avtalu um Barentshavið, áðrenn onnur lond fara at gera vart við seg har**

RÆTTINDI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tá Kina, USA og onnur lond fara at gera vart við síni áhugamál í pólhavinum, kann tað verða ov seint hjá norðmonnum og russum. Tí eiga tey bæði londini at kvika sær at gera eina sínamillum avtalu um økið.

Tað heldur norski professarin Willy Østreng. Eftir hansara tykki er løtan komin, at norðmenn og russar eiga at gera eina avtalu um alt sivilt virksemi í Barentshavinum.

– Vit eiga at fáa í lag eina avtalu, sum ásetir reglur fyri øllum sivilum virksemi í økinum, sum norðmenn og russar kunnu semjast um. Tað er tað einasta, sum vit kunnu gera, um vit skulu tryggja okkum ávirkan, tá stór lond sum Kina og USA og fleiri onnur lond fara at venda eygunum ímóti pólhavinum, segði Willy Østreng á einari ráðstevnu um vikuskiftið.

Hann vísir á, at pólhavið er tað einasta stóra heimshavið, sum ikki er gagnnýtt enn, og at Noreg og Russland kunnu bjóða hinum londunum upp í samstarvið og á tann hátt fáa eina avtalu, sum verður galdandi fyri alt økið.

– Men taka vit og russar ikki tað fyrsta stigið, missa vit møguleikan at fáa okkara ávirkan, sigur norski professarin.

## Ikki lætt

Willy Østreng heldur, at norðmenn hava ilt við at sleppa teirri gomlu vanahugsanini frá kalda krígnum, men skulu norðmenn fáa nakra ávirkan á viðurskiftini í Barentshavinum, noyðast teir at samstarva við russar og at venda summum av teimum gomlu sameindu bakið.

Sjálvur heldur hann, at tað eigur at bera til at fáa ein sáttmála við russar um ta sivila virksemið í økinum. Hann vísir á, at londini bæði samstarva longu um fiskiskap, umhvørvi og tilbúgving í Barentshavinum, og at hetta samstarv eigur at leggja lunnar undir uppaftur størri samstarv.

– Eingin skal kortini halda, at hetta letur seg gera eftir einum degi. Tað verður ein drúgv og áhaldandi togan, men hon verður neyðug, skulu vit fáa nakra ávirkan á viðurskiftini í okkara nærumhvørvi, sigur Willy Østreng.

## Eisini markið

Professarin heldur, at arbeiðið við at fáa eina slíka seravtalu í lag kann hjálpa norðmonnum og russum við at loysa ymsar spurningar. Eitt nú heldur hann, at hetta arbeiðið kanska kann enda við, at londini kunnu semjast um ta endaligu býtislinjuna í Barentshavinum, sum tey hava verið ósamd um í meiri enn 30 ár.

– Tað er greitt, at vit fáa ikki miðlinjubýtið, sum Noreg hevur hildið uppá, ella landgrunnabýtið, sum Russland krevur. Tí má trætan loysast við einari neyðsemju, sama um tað verður í ár ella um nøkur ár, sigur Willy Østreng.

Hann heldur, at kanska eiga norðmenn at taka málið um býtið í Barentshavinum upp, nú Vladimir Putin syngur sítt seinasta ørindi í Kreml, tí tað er lítið hugsandi, at ein nývaldur russiskur forseti er serliga hugaður fyri at